# - Føroyar loysa innan 2012

**Hóskvøldið skipaði Norðuratlantsbólkurin fyri kvøldsetu á Rex í Havn**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið varð kvøldseta á Rex í Havn, har Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi skipaði fyri. Yvirskriftin fyri kvøldið var "Nær loysa føroyingar og grønlendingar?"

Við pallborðið sótu Høgni Hoydal, Torbjørn Jacobsen, Kuubik Kleist og Lars Emil Johansen. Høgni Hoydal segði seg vænta, at Føroyar høvdu skipað seg sum fullveldi í seinasta lagi í 2012 ella longu í næsta valskeiði. Hann segði, at allar frælsisrørslur upplivdu, at mótrák komu, og tað helt hann, at núverandi samgonga hevði víst seg at vera. Hann helt ikki, at búskaparligar forðingar vóru fyri at loysa Føroyar frá Danmark.

Tey bæði grønlendsku umboðini nýttu ein part av tíðini at greiða frá arbeiðnum at samráðast við danir um ráevnini í grønlendsku undirgrundini, og himpraðust ikki við at siga, at talan kann vera um oljunøgdir, ið minna um tær hjá Saudiarabia. Eisini tosaði Lars Emil Johansen um tað sokallaða Stockholm-syndromið, ið hann helt at føroyingar og grønlendingar vóru plágaðir av. Hetta hugtakið kom fyrstu fram undir eini gíslatøku í Stokkhólmi, har gíslarnir fingur samhuga við gíslarænarunum, og hetta helt grønlendski fólkatingsmaðurin kundi samanberast við tey, ið halda at blokkstuðul og aðrar veitingar verða givnar av filantropiskum orsøkum, sum tey grønlendsku umboðini tóku til.



*Tobbi treiv í eina grønlendska vísu saman við Kuubik Kleist og Lars Emil Johansen*

### Framførdu á grønlendskum

Ta mest undirhaldandi røðuna borgaðai Torbjørn Jacobsen fyri. Av tí at hann ikki er valdur í Fólkatingið, segði hann seg vera komin ístaðin fyri Anfinn Kallsberg, sum hann kallaði tann fyrrverandi fullveldisleiðaran, ið nú hevði sett fullveldisgongdina í bakkgear, sum hann tók til.

Hann helt heldur ikki, at Danmark hevði verið eins høgt í metum uttanlands, um tað ikki hevði havt Føroyar og Grønland við í ríkinum.

- Nær hava vit sæð fúrstan í Luksemburg til morgundrekka hjá George Bush, spurdi Torbjørn Jacobsen retoriskt, og sipaði til støddina hjá Danmark uttan ríkispartarnar í Norðuratlantshavi.

Torbjørn Jacobsen endaði sína framløgu við, at hann heitti á teir báðar grønlendingar koma at syngja eina grønlendska vísu við sær. Saman verða teir kallaðir "húsorkestrið" á Kristiansborg, varð sagt, og Uni Reinert Debess, ið annars undirhelt hetta kvøldið, hevði eftir øllum at døma einki ímóti at læna teimum guitaran.

---

# Sellospælari solistur hjá Føroya Symfoniorkestri

**17. september verður heystkonsert hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum. Á skránni verður ouverturan til Cosi fan tutte av W. A. Mozart, Variatiónirnar yvir eitt rokokkotema av P. Tschaikowsky, Kol Nidrei av Max Bruch og 2. symfoni av J. Brahms**



KONSERT

Konsertin verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 17. september klokkan 16. Á skránni er ein av teimum vøkru ouverturunum eftir W. A. Mozart.

- Sum solist hevur FSO hesa ferð kenda sellospælaran Anders Øberg, sum annars hevur verið orkestrinum ein sera góður stuðul og vinur, og hevur hjálpt okkum við framførslum ikki færri enn 20 framførslum, sigur Symfoniorkestrið í tíðindaskrivi.

Anders Øberg spælir fyrst eitt verk av Tschaikowaky, Variatiónir yvir eitt rokokkotema. Hugtakandi verk fyri sello og orkestur. Síðani vakra verkið av Max Bruch, Kol Nidrei.

Eftir steðgin verður stórfingna 2. symfoniin av Johannes Brahm. Hon hevur fýra satsir í vøkrum og pastoralum lagdámi.

Anders Öberg er føddur og uppvaksin í Skellefteå í Svøríki. Ellivu ára gamal fekk hann fyrstu undirvísingina í sellospæli. Sekstan ára gamal byrjaði hann á Jútska Musikkháskúlanum og var næmingur hjá Hans-Erik Deckert. Eftir fýra árum har kom hann til Keypmannahavnar at halda fram at studera hjá Erling Blöndal-Bengtsson. Í 1977 vann hann kappingina at gerast tónleikari í Kongaligа Kapellinum, har hann síðani 1980 hevur verið solosellistur. Bert hevur hann tvey ár (90-92) verið solosellistur í Radiosymfoniorkestrinum.

Annars kann leggjast afturat, at Anders Öberg er ein serligur vinur hjá Føroya Symfoniorkestri og hevur ikki færri enn tjúgu ferðir verið her og stuðlað orkestrinum við framførslum.

Dirigentur: Bernhard Wilkinson

Solistur: Anders Öberg, solosellistur í Kongaliga Kapellinum

---

Skótafylki Sigmunds Brestissonar:

# SSB skótarnir opið hús hús



SKÓTAR

Nú verður byrja aftur!

Leygardagin 19 august frá kl. 14.00 til 16.00 bjóðar Skótafylki Sigmunds Brestissonar øllum áhugaðum, ið hava hug at gerast úlvaungar, úlvar ella skótar í SSB, niðan í skótahúsið við Havnará at melda seg til skótaárið 2006/2007.

- Høvið verður at hitta leiðarar og aðrar úlvar og skótar, og okkurt gott verður hjá børnunum at fáa, og kaffi og the til tey vaksnu, siga skótarnir í tíðindaskrivi.

Sum úlvungi, ulvur og skóti má eg duga mangt og hvat:

at stoppa hosur, at gera mat,...

at knýta knútar minst í hundratal...

alt djóralív skal eg kenna væl,...

til kappingar í haga farast skal,...

vit eiga flokkar í hópatal...

- Hevur tú áhuga í at koma í ein av flokkunum: Tjaldur, Spógvan, Staran, Lóm, Ravn, Heyk, Vípuna, Teistan, Snípuna, Músabróður, Svanur, Svalur, Reyðhálsur, Kvørkkveggjan ..... so kom niðan í skótahúsið leygardagin 19. august 2006, siga SSB skótarnir, sum leggja afturat:

Minnist til at: "GULIR ERU KULIR"!

